# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Beinir Johannesen, løgtingsmaður

**Svarari:** Magnus Rasmussen, landsstýrismaður í umhvørvis- og vinnumálum

**Evni:** Tinglýsing

**Spurningar:**

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera tinglýsing v.m. skjótari at avgreiða?
2. Um ja, nær kann man vænta, at broytingar verða framdar hesum viðvíkjandi?

**Viðmerkingar:**

At fáa skjøl tinglýst kann oftani taka langa tíð. Fólk kunnu bíða í eitt langt tíðarskeið, og verða fólk sett í eina bíðistøðu, tá tey m.a. skulu seta búgv o.a.

Seinastu árini eru fleiri enn 10.000 skjøl send til tinglýsingar, verður upplýst av Umhvørvisstovuni á heimasíðu teirra.

Tí hevði verið áhugavert at vitað, um nøkur ætlan er um at gera tinglýsing skjótari at avgreiða og lættari at umsita, og nær man kann vænta broytingar.

**Á Løgtingi, 9. november 2021**

Beinir Johannesen